Ov líti› kjak

Jóannes Eidesgaard heldur ikki, at ta› hev›i bori› til hjá føroyingum at tiki› stø›u til evrumáli› í gjár. Til ta› hava vit havt alt ov líti› kjak

JOHN JOHANNESSEN

Forma›ur Javna›arfloksins heldur ikki, at føroyingar høvdu veri› búnir til at tiki› stø›u til evruna saman vi› dønum í gjár.

– Vit skulu minnast til, at danir hava havt drúgt kjak um evruna seinastu mongu mána›irnar, tí vóru teir í gjár búnir til at taka stø›u til hetta álvarsmál, sigur Jóannes Eidesgaard.

Kanna máli›

Jóannes Eidesgaard heldur, at ta› kunnu bæ›i vera fyrimunir og vansar vi› at fáa evruna sum gjaldoyra í Føroyum. Men ta› er ney›ugt at fáa útgreina› hesar fyrimunir og vansar.

Tí heldur Jóannes Eidesgaard, at løgma›ur fyri langari tí› sí›ani átti at havt sett ein bólk av búskaparfrø›ingum at greina evruspurningin, solei›is at føroyingar hava fortreytir fyri at gera av, hvat gjaldoyrasamstarv hóskar okkum best.

Har›ar treytir

Landsst‡ri› sigur í sáttmálauppskoti sínum í sambandi vi› samrá›ingarnar um ríkisrættarligu stø›una, at føroyingar ynskja framhaldandi at hava gjaldoyrasamstarv vi› danir.

Hetta merkir, at var úrsliti› av donsku fólkaatkvø›uni í gjár eitt ja samstundis, sum Føroyar framhaldandi skulu hava gjaldoyrasamstarv vi› Danmark, ver›ur evran gjaldoyra í Føroyum.

Men at hava evruna sum gjaldoyra setir har›ar treytir til búskaparpolitikkin. Treytir, sum vit vi› verandi gjaldoyrasamstarvi sleppa undan.

Í hesum sambandi heldur Jóannes Eidesgaard, at vit eiga at kanna, hvørjar treytir ymisk gjaldoyrasamstarv hava, solei›is at vit hava naka› at taka stø›u út frá.

Samanumtiki› eftirl‡sir Jóannes Eidesgaard einum meira djúptøknum kjaki um evruspurningin í Føroyum.

Rætt at velja evru

JOHN JOHANNESSEN



Øll vita at evran kemur at ver›a okkara gjaldoyra fyrr ella seinni. Tí kundu vit uttan hóvasták atkvøtt ja á einari føroyskari fólkaatkvø›u í gjár.

Hetta heldur Óli Breckmann, forma›ur í Fólkaflokkinum.

Óli Breckmann heldur, at um vit skuldu havt fólkaatkvø›u, kundi hon eins væl veri› í gjár saman vi› teirri donsku.

– Máli› skal jú avgrei›ast hóast alt, og vit vita, at evran ver›ur okkara gjaldoyra, sta›festir Óli Breckmann.

Skulu fylgja Danmark

Edmund Joensen heldur ikki, at vit hava nakran annan møguleika, enn at fylgja dønum, tá ta› ræ›ur um gjaldoyra samstarv

JOHN JOHANNESSEN

Vit skulu fylgja Danmark í gjaldoyraspurninginum.

Hetta heldur Edmund Joensen, forma›ur Sambandsfloksins.

Edmund Joensen vísir á, at Føroyar ikki kunnu hava sjálvstø›ugt gjaldoyra. Tí mugu vit hava eitt gjaldoyrasamstarv vi› anna› land, og besta møguleikan heldur hann vera, at vit samstarva vi› ES gjøgnum Danmark.

Edmund Joensen heldur, at onnur smærri gjaldoyru fara at vikna, tá evran ver›ur veruleiki, og tí er ney›ugt, at vit eru vi› í einum samstarvi, har evran er gjaldoyra›.

Og at Danmark fer upp í evrusamstarvi›, fatar Edmund Joensen sum naka› heilt náttúrligt.

Edmund Joensen heldur tó, at vit mugu fáa eitt veruligt kjak í lag í Føroyum um evruspurningin.

– Eitt kjak er jú altí› til fyrimuns, vísir Edmund Joensen á.

Forma›ur Sambandsfloksins heldur einasta vansan vi› evruni vera, at føroyingar skulu læra seg at hugsa í n‡ggjum gjaldoyra. Men hetta heldur hann avgjørt vigar upp móti handilsligu fyrimununum.

Bí›a eftir danska úrslitinum

Sámal Petur í Grund úr Sjálvst‡risflokkinum heldur, at vit eftir donsku fólkaatkvø›una skulu hava eitt føroyskt kjak um evruna

JOHN JOHANNESSEN

Sámal Petur í Grund heldur ta› ikki vera rætt, at danir skulu gera av, um gjaldoyra› í Føroyum skal vera evra ella okkurt anna›.

Tí heldur hann, at vit eftir evruvali› mugu fáa í lag eitt kjak, um hvat gjaldoyrasamstarv vit ynskja.

– Sjálvur havi eg einki ímóti, at Føroyar vera vi› í evrusáttmálanum, tí onnur smærri gjaldoyru kunnu skjótt gerast veik, samanbori› vi› evruna, sigur Sámal Petur í Grund.

Sámal Petur í Grund heldur ikki, at vit í Føroyum skulu hava eina fólkaatkvø›u um gjaldoyraspurningin. Hetta heldur hann ikki vera ney›ugt, tá vit ikki hava naka› sjálvstø›ugt, føroyskt gjaldoyra.

Evran hóttir fólkaræ›i›

Jenis av Rana heldur, at vit mugu hava eitt sjálvstø›ugt føroyskt val um evruna, so hon ikki ver›ur kroyst oman yvir okkum

JOHN JOHANNESSEN

At taka undir vi› evruni er at fara eitt fet nærri ESlimaskapi og eitt fet nærri eini kúgan av fólkaræ›inum.

Hetta heldur Jenis av Rana, forma›ur í Mi›flokkinum.

Jenis av Rana heldur ES vera eina stóra hóttan móti fólkaræ›inum, og tí mugu vit hava eitt grundleggjandi føroyskt kjak um evruna, solei›is at vit vita, hvørjar avlei›ingarnar av henni eru.

– At enda skulu vit hava eina sjálvstø›uga føroyska fólkaatkvø›u um evruna, heldur Jenis av Rana.

Samstarvi› skal vera vi› Danmark

Karsten Hansen, landsst‡risma›ur í fíggjarmálum, heldur, at vit skulu hava gjaldoyrasamtarv vi› Danmark, líkamiki› um ta› ver›ur vi› evru ella krónu

JOHN JOHANNESSEN

Samgongan hevur í ríkisrættarliga spurninginum sett sær fyri, at Føroyar skulu hava sítt gjaldoyrasamstarv vi› Danmark, um so danir velja evruna ella ikki.

Hetta sta›festir Karsten Hansen, landsst‡risma›ur í fíggjarmálum og umbo› fyri Tjó›veldisflokkin í landsst‡rinum.

Karsten Hansen vísir á, at hetta merkir, at um danir fara upp í evru samstarvi, koma føroyingar ta› av sær sjálvum – eisini um vit fáa fullveldi.

Saknar kjak

Karsten Hansen heldur tó, at vit hava havt ov líti› kjak um evru spurningin í Føroyum. Hann heldur, at máli› átti at veri› umrøtt í tinginum, men kortini ivast hann í, um ta› hev›i veri› rætt at havt eitt veruligt or›askifti á tingi, um hetta máli›.

– Vit sita í løtuni í samrá›ingum vi› danir, og tí er ógvuliga torført hjá okkum at melda út okkara stø›u til evruna, á›renn danir hava tiki› stø›u, sigur Karsten Hansen.

Landsst‡risma›urin í fíggjarmálum vísir á, at melda›u vit út, at vit eru ímóti evruni, hev›i hetta ikki veri› væl móttiki› av donsku stjórnini, og hev›i ta› tí møguliga skatt samrá›ingarnar.

Serliga heldur Karsten Hansen, at hetta hev›i veri› galdandi, um vit luttóku á fólkaatkvø›uni og úrsliti› gjørdist eitt føroyskt nei til evruna.

Tí ivast Karsten Hansen, um ta› veruliga hev›i veri› rætt, at føroyingar í gjár luttóku í donsku fólkaatkvø›uni um evruna.

Veljarakanningar skulu avmarkast

Fleiri danskir flokkar taka undir vi› at avmarka tali› á veljarakanningum upp undir og sjálvan valdagin. Tær eru oy›ileggjandi fyri demokratii›, siga flokkarnir

Ta› loypti ø›i í fleiri politikarar á Christiansborg, at danska sjónvarpsstø›in, TV2 almannakunngjørdi eina stóra exit poll veljarakanning mitt undir evruvalinum í gjár

MAGNUS DAM KEYPMANNAHAVN

Ta› er veljarakanningin hjá TV2, sum var› almannakunngjørd klokkan 13 í gjár, sum hevur fingi› ø›i í donsku flokkarnar. Politikkararnir halda, at TV2 er fari› út um út um mark›i› fyri, hvat er etiskt rætt.

Veljarakanningin hjá TV2 var ein sokalla› exit-poll. Ta› vil siga, at hon er gjørd á valstø›um kring landi›. TV2 spurdi meira enn 10.000 veljarar, sum høvdu veri› inni og atkvøtt, hvar teir settu krossin. Ta› er ongantí› hent á›ur í Danmark, at úrsliti› av einari exit-poll er almannakunngjørt, á›renn valhølini eru latin aftur.

Fleiri serfrø›ingar halda eisini, at ta› er skeivt at almannakunngera slíkar kanningar, á›renn valhølini eru latin aftur, tí tær kunnu ávirka veljararnar, sum ikki enn hava veri› á vali.

Noy›ast at lóggeva

Politiken og Jyllands Posten skriva›u í gjár, at fleiri flokkar leggja upp til at broyta vallógina. Danska Innanríkisrá›i› seg›i fyrradagin, at ta› ikki er brot á vallógina at almannakunngera eina exit-poll sjálvan valdagin, men Innanríkisrá›i› heldur, at ta› er ney›ugt at endursko›a verandi lóggávu.

Ulla Tørnæs, politiska framsøgukvinnan hjá Vinstra, harma›ist í Jyllands Posten í gjár um, at TV2 ikki hevur tiki› atfinningarnar til eftirtektar.

– Hetta noy›ir okkum at umhugsa ein lógarbroyting. Fari› er út um mítt etiska mark, tá i› úrsliti› av tílíkum kanningum ver›ur almannakunngjørt, á›renn valhølini eru latin aftur, seg›i hon.

Bendt Bendtsen úr Konservativa Fólkaflokkinum er samdur.

– Vi› hesari exit-poll kanningini fer TV2 langt út um ta› moralskt forsvarliga. Kanningin kann ávirka bæ›i valluttøkuna og úrsliti› av sjálvum valinum. Skilir TV2 ikki eina grei›a áheitan frá Christiansborg, so mugu vit lóggeva, seg›i Bendt Bendtsen.

Forma›urin í Sosialistiska Fólkaflokkin, Holger K. Nielsen, sigur, at hann fer leggja fram uppskot um eina lógarbroyting, um TV2 ikki av sínum eintingum gevst vi› slíkum kanningum.

– Hetta kann als ikki gó›takast, sigur hann.

Teir einastu flokkarnir, sum ikki taka undir vi› einum beinlei›is banni, eru danski Javna›arflokkurin og Eindarlistin. Men bá›ir flokkarnir finnast kortini hvassliga at TV2.

Flyta fokus

Kanningin hjá TV2 hevur eisini fingi› politikkararnar at hyggja at øllum ø›rum veljarakanningum, sum ver›a almannakunngjørdar upp undir og sjálvan valdagin.

Bendt Bendsten seg›i vi› Politiken í gjár, at tær mongu veljarakanningarnar flyta fokus frá tí veruliga kjakinum.

Saman vi› SF mæla teir konservativu til, at veljarakanningar ver›a banna›ar nakrar dagar upp undir sjálvan valdagin. SF mælir til, at ta› ikki skal ver›a loyvt at almannakunngera veljarakanningar tveir dagar á›renn sjálvan valdagin.

Í fleiri londum finst eitt tílíkt evstamark, og í nøkrum londum er ta› banna› yvirhøvur at gera veljarakanningar.

Kommunuvali› ver›ur útsett

Rættarnevndin mælir eftir áheitan frá løgmanni løgtinginum til at útseta kommunuvali› til 21. november

JOHN JOHANNESSEN

Rættarnevndin tók í gjár undir vi› eini áheitan frá løgmanni um broyta dagfestingina fyri komandi kommunuvali solei›is, at vali› ver›ur 21. november.

Í broytingaruppskotinum til løgtingslógina um val til allar føroyskar kommunur stendur, at vali› skal fara fram annan t‡sdag í november.

Men hetta heldur løgma›ur vera ov tí›liga í ár, av tí at lógin um kommunuvali› skal l‡sast seks vikur framman undan valinum. Ta› vil siga, at lógin skuldi veri› l‡st í seinasta lagi 3. oktober. Og tá hevur tingi› ikki havt stundir at havt uppskoti› til a›ru og tri›ju vi›ger›ar.

Hesum tekur rættarnevnin undir vi›, og mælir í áliti sínum løgtinginum til at skoyta upp í lógina, at fyrsta vali› eftir n‡ggju lógini fer fram t‡sdagin 21. november.

internethandilin

hallo.fo

Tórshavn - Tlf. 218500 - hallo@hallo.fo

ERICSSON NOKIA SIEMENS MOTOROLA

NOKIA 3210

- Innbygda antennu
- SMS
- 3 spøl
- Sera nemt at skifta front,ið fæst í fleiri litum

kr. 1.599,-

SIEMENS M35i

- Lítil, gul og cool
- Innbygda antennu
- Vibrator
- SMS
- 4 spøl

kr. 1.999,-

MOTOROLA V.2288

- Innbygt FM radio
- v/ stereo headset
- SMS
- Sera nemt at skifta front,ið fæst í fleiri litum
- 2 frontar fylgja við

kr. 2.299,-

Sosialurin - 311820

Keyp tá ið tygum hava tíð... Vit hava opið nú og 24 tímar um døgnið - hvønn dag á www.hallo.fo

www.hallo.fo

Bílegg on-line á www.hallo.fo ella ring tel. 218500